# innisvarða aftur



*Jákup Suni Lauritsen og Eddie Lauritsen hyggja eftir vala verkinum. Henda minnisplátan vigar 750 kilo*

## Við ótta og bivan

Fólkið í Mykinesi veit alt um tann týdning, sum fuglurin og fiskurin hava havt fyri tey.

Uttan møguleika at søkja bjørgini og sjógvin, hevði illa borið til at búleikast á hesi vestastu oyggj okkara. Men hetta hevur eisini kravt sítt.

Mangan sóust kvinnurnar fara niðan á eitt stað, ovarlaga í bygdini, á somu leið har gingið verður út í Mykineshólm og tey góðu fleygingarstøðini.

Á hesum staði høvdu tær gott útsýni yvir havleiðirnar vestanfyri og inn ímóti Vágalandinum.

Her á tromini stóðu tær mangan óttafullar og eygleiddu havið og havsins brúsan, meðan tær í hjarta bóru ynskið og bønina um, at teirra kæru máttu koma heilskapaðir aftur at landi.

Sum oftast gekk væl hóast sjóarilskuna, men tað var ikki altíð: Ein ella fleiri av teirra kæru komu ikki aftur av sjóferð ella bjargaferð – 27 á sjónum og 10 í bjørgunum

Tá menn í síni tíð skuldu taka støðu til, hvar minnisvarðin skuldi setast, var eingin ivi um, at hetta plássið var einasta rætta.

Her varð minnisvarðin settur tá – og tað er somuleiðis á hesum staði, at hann nú er endurreistur.

Listin yvir teir farnu er dagførdur á minnisplátuni. Og her kann tann vitjandi bara staðfesta sum teksturin á talvuni eisini sigur tað:

**Harrin gav. Harrin tók. Lovað veri Harrans navn!**




*Í Merkis-verdu minnisplátuni standa nøvnini á teimum 27 monnunum, sum farnir eru á sjónum síðani 1884*

*» Her á tromini stóðu tær mangan óttafullar og eygleiddu havið og havsins brúsan, meðan tær í hjarta bóru ynskið og bønina um, at teirra kæru máttu koma heilskapaðir aftur at landi «*

*» Einki er gjørt við hann øll hesi mongu árini, og nú var hann næstan dottin niður. Tað vildu vit ikki hava sitandi á okkum «*